# Sosialurin

Nr 8 Týsdagur • 14. januar 2003 • 77. árgangur • Kr. 12,00




Sløkkiliðsmenn í Kollafirði:

## Fingu ikki boðini

Síða 19-19



## Tyrlan fór gjøgn-um Vágatunnilin

Síða 3



HSF-formaðurin:

## Kvinnuland-sliðið kemur

ítróttur 23-30



Eftir avgerð løgmans:

## Advokatar melda pass

Síða 8



*Sivilklæddir løgreglumenn fylgja manninum við viðføri sínum til løgreglubilin, sum flytir hann til Havnar til avhoyring*

# Tikin við narko á flogvøllinum

**Hundurin hjá Tolleftirlitinum fann um middagsleitið mánadagin narkotika í viðførinum hjá einum ferðafólki, sum kom við flogfari til Føroya**

Eftirlit

*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Tá flogfarið hjá Maersk Air kom í Vágar stutt fyri middag mánadagin, fann hundurin hjá Tolleftirlitinum narkotika í viðførinum hjá einum donskum ferðamanni, sum við var.

Løgreglan varð boðsend, og fólk av politistøðini í Havn kom vestur. Maðurin varð handtikin og fluttur til Havnar til avhoyringar.

Áðrenn blaðið fór til prentingar bar ikki til at fáa nágreiniliga at vita, hvat slag av narko, talan var um.

Men Sosialurin skilir, at í hvussu er kokain er ímillum. Eisini skulu vera anabolskar steroidur og onkrar tablettir eisini. Sum skilst eru nøgdirnar ikki so øgilga stórar.

Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá Løgregluni, visti beint fyri evstamark hjá blaðnum ikki meira nágreiniligt at siga um málið.

Tað skiltist, at fleiri vóru í ferðalagnum, men hundurin gjørdi bara vart við viðføri hjá tí eina manninum.


Útsølan Byrjar 14. januar kl. 10.00

Stásið Niels Finsensgøta tlf. 330424

Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen

Høgabøl • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

ÚTSØLAN BYRJAR TÝSDAGIN 14. JANUAR

ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM

Tel. 44 73 99